Álit

í

løgtingsmáli nr. 11/2020: Uppskot til løgtingslóg um lønaríkoyti til starvsfólk og stuðul til sjálvstøðug vinnurekandi, 67 ár ella eldri, sum eru heimsend ella hava inntøkumiss orsakað av COVID-19

Landsstýrismaðurin í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, hevur lagt málið fram 13. august 2020, og eftir 1. viðgerð 13. august 2020 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 13. august 2020.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Fakfelagssamstarvið og við landsstýrismannin í almannamálum.

Trivnaðarnevndin metir, at tað er av alstórum týdningi, at skipanin verður longd, so at hjálparpakkarnir í sambandi við COVID-19 fylgjast at, soleiðis at rættarstøðan hjá borgarunum verður tryggjað.

Harumframt hava Sirið Stenberg, Hervør Pálsdóttir og Djóni Nolsøe Joensen hesar viðmerkingar:
Vit vilja staðiliga vísa á, at arbeiðið í landsstýrinum ikki er nóg væl samskipað og fyrireikað. Arbeiðið ber týðiliga brá av stutttíðar hugsan og manglandi atliti til løntakaran. Við uppskotinum verða fólk, sum verða sett í sóttarhald av myndugleikunum, ella eru sjúk av koronu, fevnd av dagpeningaskipanini. Tí taka vit undir við. Men í nevndarviðgerðini er eisini komið fram, at nógvir løntakarar als ikki eru fevndir av nakrari skipan. Hetta tí at COVID-19 skipanin í ALS ikki loyvir nýggjum fólkum inn. Tí verða tað uttan iva tímalønt fólk í privatu vinnuni, sum verða við skerdan lut og einki trygdarnet hava, um tey ikki sleppa til arbeiðis orsakað av, at arbeiðsplássið er stongt ella rakt av koronu. Tað kann t.d. vera innan matstovuyrkið, handil, handverk og aðrar týðandi vinnur.
Sum vit skilja, verður als ikki arbeitt í landsstýrinum við at fáa hetta í rættlag, og tískil eru vit stúrin um tey fólk á privata arbeiðsmarknaðinum, sum kunnu fara at standa á berum, nú ongin skipan loftar. Vit stúra fyri, at løntakarar kunnu koma í sera trupul fíggjarlig kor, nú støðan er, sum hon er, og skilja als ikki, at løntakarin ikki er betur vardur.
Vit heita tí staðiliga á landsstýrið um at fáa hesi viðurskifti í rættlag beinanvegin, so fólk kunnu kenna seg trygg, um teirra arbeiðspláss verður rakt. Eisini meta vit, at stórur tørvur er á langtíðarætlan og strategi í sambandi við koronustøðuna fyri at tryggja, at vit ikki aftur koma í slíka støðu, har partar av hjálparpakkunum eru í gildi, meðan aðrir ganga út.
Hetta lógaruppskot hevur ikki tikið hædd fyri teimum fólkum, sum koma í klemmu, tá ið skipanirnar soleiðis umskarast.

Ein samd nevnd setir fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Í § 1, verður sum stk. 2 sett:

1. "*Stk. 2.* Hóast stk. 1 er løgtingslógin bert galdandi fyri teir persónar, sum fingu lønaríkoyti ella stuðul sambært tágaldandi løgtingslóg nr. 44 frá 7. apríl 2020, sum broytt við løgtingslóg nr. 102 frá 25. juni 2020."

Viðmerkingar:
Við hesi broyting verða starvsfólk og sjálvstøðug vinnurekandi, 67 ár ella eldri, javnsett við tey, sum eru í tíðaravmarkaðu COVID-19 stuðulsskipanini hjá ALS.

Við hesi broyting tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 13. august 2020

Uni Rasmussen
formaður

Sirið Stenberg
næstformaður

Djóni Nolsøe Joensen

Hervør Pálsdóttir

Rósa Samuelsen

Jóhan Eli Poulsen

Frimodt Rasmussen